UTTAN ÚR HEIMI

## Pávin í øðini um grundlóg

Jóhannes Páll pávi er sera misnøgdur við, at kristindómurin ikki verður nevndur við einum einasta orði í teirri nýggju grundlógini hjá Evropasamveldinum.

– Vit kunnu ikki gloyma okkara kristnu røtur, segði pávin í bøn síni á Pætursplássinum sunnudagin. Hann takkaði teimum polsku biskuppunum, sum eisini hava sagt seg vera misnøgdar við, at kristindómurin ikki verður nevndur í grundlógini. Í einari kunngerð frá biskuppunum í Pólandi stóð, at tað ber ikki til at byggja eitt evropeiskt hús við at snara søguni.

Í teirri nýggju grundlógini hjá ES verður víst á tann felags evropeiska mentanarliga, átrúnaðarliga og humanistiska arvin, men kristindómurin verður ikki nevndur. Serliga Frakland var ímóti at nevna kristindómin í grundlógini, ivaleyst tí at har búgva rættiliga nógvir muslimar.

## Gøla skakar Ukraina

Í Ukraina eru andstøðupolitikarar og onnur á gosi, eftir at tað er komið fram, at ein versonur Leonid Kutsjma, forseta hevur keypt tað størsta stálverkið í landinum fyri 780 milliónir dollarar, sjálvt um fleiri hægri boð komu inn. Eitt nú vildu russiskar, vesturevropeiskar og amerikanskar fyritøkur rinda meiri fyri verkið.

Stjórnin hjá Leonid Kutsjma vísir øllum skuldsetingunum aftur. Hon vísir á, at sambært útbjóðingartilfarinum kundu bara fyritøkur, sum høvdu framleitt meiri enn eina millión tons av koli í Ukraina tey seinastu trý árini, bjóða upp á stálverkið. Tað høvdu tær útlendsku fyritøkurnar ikki, og tí kundu tær ikki fáa verkið. Andstøðan sigur, at í veruleikanum var ikki talan um nakra útbjóðing, tí ætlanin hjá stjórnini var alla tíðina, at versonur forsetans skuldi fáa stálverkið.

Forsetaval verður í Ukraina í oktober. Leonid Kutsjma hevur boðað frá, at hann ætlar sær frá, og ta seinastu tíðina hava myndugleikarnir gjørt alt fyri at órógva valevnið hjá andstøðuni, skrivar Reuters.

## Clinton illur

Fyrrverandi amerikanski forsetin Bill Clinton var um at missa tamarhaldi á sær sjálvum, tá bretska sjónvarpið BBC tosaði við hann nú um dagarnar um ævisøguna, sum Clinton júst hevur givið út.

Í samrøðuni spurdi sjónvarpsmaðurin, um Clinton iðrar seg um sambandið við skrivstovukvinnuna Monicu Levinsky. Sjónvarpsmaðurin var ikki nøgdur við svarið, sum hann fekk og endurtók tí spurningin fleiri ferðir. Men tað var í meira lagi fyri Clinton, sigur ein starvsmaður hjá BBC, sum hevur sæð samrøðuna, sum BBC sendir í kvøld.

Nógvir amerikanskir fjølmiðlar hava tosað við Bill Clinton um ta nýggju bókina, men bretsk tíðindafólk halda, at teirra amerikonsku starvsfelagar hava verið alt ov lagaligir við fyrrverandi forsetan.

## Dømir ikki Hitler

Tann 9. oktober í 1942 skrivaði skrivarin hjá Adolf Hitler, Martin Bormann, undir boðini um at útrudda jødarnar í Evropa. Hóast hann formliga var skrivari hjá Føraranum, var Bormann roknaður sum ein tann týdningarmesti samstarvsfelagin hjá Hitleri.

Men elsti sonur Bormann, sum eisini eitur Martin Bormann, vil ikki fordøma pápan og heldur ikki Hitler sjálvan. Við blaðið Súddeutsche Zeitung sigur tann 74 ára gamli Martin Bormann, at pápi hansara hevði ábyrgdina av jødatýningini sum heild, men at hann hevði ikki ábyrgdina av tí, sum hendi í teimum ymsu týningarlegunum. Martin Bormann sigur, at pápi hansara var ikki ein harðrendur maður, og at hann hevði ikki kunnað beint fyri nøkrum.

– Eg havi lært, at øll fólk kunnu mistaka seg. Summi sleppa ongantíð burtur úr mistakinum, men tann einasti, sum kann døma pápa mín og Hitler, er Guð, sigur Martin Bormann við Súddeutsche Zeitung.

# Hótta við at avrætta hann

**Tann 33 ára gamli suðurkoreanski handilsmaðurin Kim Sun-il verður hálshøgdur, tekur Suðurkorea ikki sínar hermenn úr Irak**

IRAK
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*



*Tann 33 ára gamli suðurkoreanski handilsmaðurin verður hálshøgdur, tekur Suðurkorea ikki sínar hermenn úr Irak*

– Vælsignaðir, farið úr Irak. Eg vil ikki doyggja, segði Kim Sun-il á sjónbandinum, sum arabiska sjónvarpið Al-Jazeera sendi sunnukvøldið.

Aftan fyri hann hekk eitt skelti við navninum á yvirgangsfelagsskapinum Jama-'at al-Tawhid, sum jordanski yvirgangsmaðurin al-Zarqawi er oddamaður í, og sum hevur tætt tilknýti til al-Qaeda. Ein av burturflytarunum segði á sjónbandinum, at tekur Suðurkorea ikki sínar hermenn úr Irak og sleppur ætlanini um at senda 3.000 hermenn afturat hagar, verður Kim Sun-il hálshøgdur.

Tann 33 ára gamli Kim Sun-il varð burturfluttur í irakska býnum Falluja tann 17. juni. Hann arbeiddi sum tulkur hjá einari suðurkoreanskari fyritøku, sum flytir útgerð fyri amerikanska herin.

Stjórnin í Seoul helt kreppufund sunnukvøldið, og har bleiv avgjørt at halda fast um ætlanina at senda fleiri hermenn til Irak. Varauttanríkisráðharrin, Choi Young-jin, segði, at stjórnin fer at gera sítt ítarsta fyri at finna tann burturflutta Kin.

Frammanundan eru 670 suðurkoreanskir hermenn í Irak.

# Fleiri ferðamannalond í vanda fyri yvirgangi

**Týska fregnartænastan vil vera við, at vandin fyri yvirgangi í Evropa er størstur í Danmark, Fraklandi, Bretlandi, Spania og Italia**

YVIRGANGUR
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Blaðið Welt am Sonntag hevur fingið fatur á einari meting, sum týska fregnartænastan hevur gjørt av vandanum fyri yvirgangsatsóknum í Evropa.

Niðurstøðan í metingini er, at vandin fyri yvirgangi er serliga stórur í Danmark, Fraklandi, Bretlandi, Spania, Italia og Turkalandi. Harafturímóti er lítil vandi fyri yvirgangi í Noregi og Svøríki. Tá talan er um fjarløgd lond, heldur týska fregnartænastan, at vandin er størstur í Avstralia, Teilandi, Indonesia og Filipsoyggjunum.

Vandin er serliga stórur í teimum stóru býunum og serliga á støðum, har nógv fólk koma saman so sum handilsmiðstøðum og týdningarmiklum ferðamannamálum, men vandin er eisini stórur í flog- og skipaferðsluni.

Týska fregnartænastan sigur sambært Welt am Sonntag, at vandin fyri yvirgangi er størstur í londum, har nógv fólk taka undir við yvirgangsmonnunum, og har trygdartiltøkini ikki eru nóg góð. Fregnartænastan heldur, at al-Qaeda er framvegis tann størsti vandin, sjálvt um fleiri av leiðarunum í felagsskapinum eru deyðir ella tiknir. Eitt nú eru Said el-Adel og Abu Mussab al-Zarqawi framvegis á lívi, og teir hava tætt tilknýti til Evropa, skrivar Welt am Sonntag.

### Trygt at ferðast í Danmark

**Tað er framvegis trygt hjá ferðafólki at koma til Danmarkar**

Hóast tann týska fregnartænastan nevnir Danmark sum eitt av teimum londunum, har vandin fyri yvirgangi er stórur, halda teir donsku myndugleikarnir ikki, at ferðavinnan er serligt álopsmál.

– Vit hava ikki sett nøkur serlig trygdartiltøk í verk í sambandi við ferðavinnuna her, sigur Ole Torpegaard í danska uttanríkisráðnum við norska blaðið VG. Heldur ikki norska sendistovan í Keypmannahavn sigur seg hava fingið nakra ábending um, at vandin fyri yvirgangi er vaksin har.

Norska reiðaríið Color Line skal flyta umleið eina millión ferðafólk ímillum Noreg og Danmark í summar, men heldur ikki har hava tey fingið nøkur boð um størri vanda fyri yvirgangi, sigur kunningarstjórin, Helge Otto Mathisen, við VG.

# Krevja Bush at vitna

**Verjarnir hjá trimum amerikonskum hermonnum, sum eru ákærdir fyri at hava farið illa við irakskum fangum, vilja hava George W. Bush, forseta at vitna í rættinum**

IRAK
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Umframt forsetan vilja verjarnir eisini sleppa at avhoyra verjumálaráðharran, Donald Rumsfeld, sum vitni. Ein av verjunum, Paul Belgrin, hevur skuldsett Bush og Rumsfeld fyri at hava skákað sær undan Geneve-sáttmálanum. Hann vil vera við, at fangavørðurin, sum hann er verji hjá, bleiv biðin um at mýkja teir iraksku fangarnar fyri at fáa teir at siga tað, sum teir vistu.

Verjarnir kravdu eisini, at tveir av teimum ovastu amerikonsku generalunum í Irak, skuldu avhoyrast, og í gjár fingu teir sín vilja. Dómarin gjørdi av, at generalarnir John Abizaid og Ricardo Sanches skulu avhoyrast.



NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

Føroya Lærarskúli:

## 25 lærarar útskrivaðir



*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Fríggjadagin 18. juni 2004 vóru 25 lærarar útskrivaðir av Føroya Lærarskúla.**

***Fremra rað f.v.:*** Búi Brattaberg, Nina Brockie, Elsa Dam, Anna Gærdum, Birita Hansen, Erla L. í Húsinum, Katrin G. Isfeld, Bjørg Joensen, Leivur R. Joensen, og Jónina Justinussen,

***Aftara rað f.v.:*** Tórhallur Justinussen, Anetta Kalsoy, Signar á Reynatrøð, Áshild Kristiansen, Reimund Langgaard, Jónley á Løgmansbø, Jütta Reynslág, Lydia Mortensen,

Jan Terje Simonsen, Ingrid Patursson, Beinta Skaalum, Veronika Petersen, Marita Poulsen, Hans Toftegaard og Silvurlín Rasmussen.

Durita Nielsen:

## Ph.D ritgerð í sild til góðskingar

Durita Nielsen úr Havn (dóttir Arnfríðu og Svenning Nielsen) vardi tann 11. juni Ph. D. ritgerð sína, sum hon kallar »Herring - living resources and good products« við undirheitinum »A study of some factors influencing the guality of marinated herring«. Verjan fór fram á Danmark Tekniske Universitet.

Durita, sum hevur starvast á deildini fyri Fiskeindustriel Forskning á Danmark Fiskeri-undersøgelser síðani 1999, hevur seinast trý árini verið við í einari sildaverkætlan, og er tað í tilknýti til hesa verkætlan, at hon hevur skrivað ritgerðina.



Durita hevur granskað í góðskueginleikunum av ferskari sild við atliti til matvøruframleiðslu. Hon hevur millum annað kannað eftir í hvønn mun faktorar sum fitiinnnihaldið í sildini, árstíðin, kynsbúningin, støddin, hvar sildin er fiskað og goymslan um borð hevur á eginleikarnar fyri góðskingini.

Hon hevur við sínari gransking funnið fram til, at ein av meginfaktorunum fyri góðskuni er goymsluhátturin um borð, har ísingin er betri enn goymsla í kølitangum.

Kanningar hennara vísa eisini, at ein av fyritreytunum fyri góðskingini (foredlingini) er fitiinnihaldið í sildini. Og her hevur hon so funnið fram til ein einfaldan hátt hjá virkinum at máta fitiinnihaldið eftir, soleiðis at sildin lættliga kann flokkast eftir hesum.

Eitt annað, sum er áhugavert við hennara kanningunum, er, at góðskan av stórari gýtandi sild við høgum fitiinnihaldi er betri enn góðskan av smáari óbúnari sild við lítlari fiti.

Próvdómararnir (opponentarnir) sum vóru seniorforsker Bo M. Jørgensen frá Danmark Fiskeriundersøgelser í Lyngby, professor Magni Martens frá Matforsk í Noregi og dr. Ingrid Undeland frá Chalmers Tekniska Høgskola í Svøríki, vóru sera væl nøgdir við úrslitið av granskingini. Durita hevur fingið boðið granskingarstarv í North Carolina í USA, og fer hon eftir summarfrítíðina yvir hagar, har hon skal gera góðskugranskingar í alifiski.

## Málningaframsýning og tónleikacafé í Smiðjuni í Lítluvík

<u>**Tíðindaskriv**</u>

Fríggjakvøldið 18. juni kl. 19.00 læt málningaframsýning upp í Smiðjuni í Lítluvík.

Tað eru tey bæði Kristina Joensen og Ian Luid ið sýna fram. Á framsýningini eru 30 akrylmálningar.

Í samband við at framsýningin læt upp, varð tónleikacafé í Smiðjuni við Niels Midjord, Høgna Lisberg, Ronnie Poulsen, Finnur Jensen o.ø

Framsýningin er opin:
Fríggjakvøldið 18. juni frá kl. 19.00 - 22.00.
Leygardagin 19. juni - hósdagin 24. juni frá kl. 15.00 - 20.00.


### Tøkk

Hjartaliga takki eg øllum tykkum, sum mintust meg á sjeytiáradegnum 5. juni 2004 við gávum, blómum og góðynskjum við telefonsamrøðum, kort og e-mails. Tað gleddi meg stórliga. Øll góð ynskir til tykkum øll.

**Heilsan Eli Davidsen**

### Tøkk

Hjartaliga takka vit fyri sýnda samkenslu,
tá ið kæri maður, pápi, verpápi og abbi okkara

**Henry Ziska**
Klaksvík

doyði og varð jarðaður.

Tøkk til starvsfólkið í Sambýlinum í Bøgøtu fyri góða røkt og til deild M á Klaksvíkar Sjúkrahúsi.
Tøkk til prest og kirkjutænarar, sangarar og berarar.
Tøkk til tykkum, sum vitjaðu inn á gólvið og til tykkum, sum ringdu til okkara.
Tøkk fyri blómur og kransar og tykkum, sum sendu gávur til Búfólkið í Sambýlinum.
Tøkk til tykkum, sum hjálptu til við jarðarferðini og ervinum og til tykkum øll, sum fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað.

*Vegna familjuna*

**Hanna, Beinta og Jógvan**
**Krista, Hanna og Birgir**

†

Hervið verður kunngjørt fyri ætt, vinum og kenningum, at góða mamma, vermamma, omma og langomma okkara

**Anna Sofía Joensen**
vanliga rópt Lillan, ættað úr Vestmanna, búsitandi í Havn

andaðist á Lágargarði 19. juni, 84 ára gomul.

Jarðarferðin verður úr Havnar kirkju hósdagin 24. juni kl. 13.00.

*Fyri tey avvarðandi*

**Sólrun, Jónvør, Helgi og Durita**

Tey, ið vilja minnast Lilluna, kunnu lata eina gávu til Parkinsonfelagið.


### Dagurin

**22. juni. 10.000 blóðvitni.** Allir í eini herdeild hjá keisranum Hadriani gjørdust kristnir. Eftir miklar pínslur vórðu teir krossfestir á einum fjalli, summi siga á Ararat.